# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Ein hegnismaður á Glyvrum fyllir 100 ár

**Tað mundi vera undantakið tá í tíðini, at fólk høvdu fleiri útbúgvingar, men Jacob Vilhelm Hansen av Glyvrum, sum komandi týsdag fyllir 100 ár, er bæði maskinmeistaralærdur og hevur skiparaútbúgving**

FØÐINGARDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin 27. juni fyllir glyvramaðurin, Jacob V. Hansen, 100 ár.

Jacob hevur búð á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi seinastu tvey árini, og er til aldurin bæði byrgur og væl fyri. Hann sær og hoyrir eisini rímiliga væl.

Jacob hevur altíð havt stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og hann fylgir framvegis væl við tí, sum hendir.

Hann var sjómaður øll síni bestu ár og var við fleiri ymiskum skipum. Eitt nú var hann í fleiri ár við skipinum, Cementu hjá Óli á Miðgerði í Fuglafirði.

Jacob var eisini onkran túr við fiski í Bretlandi undir krígnum.

### Tvær útbúgvingar

Tað mundi vera undantakið tá í tíðini, at fólk høvdu fleiri útbúgvingar, men Jacob er bæði maskinmeistaralærdur og hevur skiparaútbúgving.

Hann sigldi øll árini sum motorpassari.

Men Jacob hevur ikki bara verið sjómaður.

Hann hevur altíð havt góðar hendur, og tí er tað ikki av tilvild, at hann seinni fór at fáast við timbur.

Jacob arbeiddi á snikkaraverkstaðnum á Glyvrum í nøkur ár, til hann sjálvur fór at smíða hús. Hann hevur soleiðis bygt nógv sethús til fólk, ið standa sum ein varði yvir tann partin av arbeiðslívinum hjá honum.

Kona Jacob, Elina, var ættað úr Kvívík. Hon var 9 ár yngri enn maðurin og doyði í 1993.

Saman fingu tey sjey børn.

### Jacob ikki elstur

Hetta er ikki fyrstu ferð, at búfólk á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi fyllir 100.

Jacob er heldur ikki elsta búfólkið á heiminum í dag. Tað er gjáarmaðurin, Karl Jacob Sigvardsen, sum fylti 101 ár 27. februar í ár.

Triðelsta fólk á heiminum í dag er Edith Klein, sum hevur verið búsitandi á Strondum, men er ættað úr Vágum.

Edith fyllir 99 í november.

Frida Jacobsen úr Leirvík og Karin Joensen úr Fuglafirði, sum báðar fyltu 100 á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi, eru farnar.

Deildarleiðarin á heiminum í Runavík, Sigrun Arnoldsen, sigur, at so undarligt, tað ljóðar, hava tey elstu búfólkini á heiminum oftast verið best fyri og hava eftir umstøðunum klárað seg ógvuliga væl.

Soleiðis er eisini við Jacobi, sum bæði letur seg í og úr sjálvur.

Og tað er eingin sjálvfylgja, tá ið tú er 100 ára gamalur.

### Føðingardagurin

Tað eru tey avvarðandi hjá Jacobi V. Hansen, Eysturoyar Røktar-og Ellisheim og Runavíkar kommuna, ið saman skipa fyri føðingardegnum, sum verður hildin millum klokkan 15 og 18 týsdagin.

Vanligt er, at løgmaður og onkur landsstýrismaður saman við kommunalpolitikarum og stovnsumboðum eru við til ein slíkan dag saman við familjuni hjá føðingardagsbarninum.

Øll eru vælkomin at heilsa upp á Jacob týsdagin millum klokkan 15 og 18.

Sigrun Arnoldsson væntar, at menu'in til føðingardagin verður gott smyrjibreyð og køkur.

Sosialurin ynskir Jacobi Vilhelm Hansen hjartaliga tillukku við stóra degnum týsdagin.



*Jacob V. Hansen hevur altí› havt gó›ar hendur, og tí var ta› ikki av tilvild, at hann fór at fáast vi› timbur, tá i› hann gavst at sigla. Hann hevur bygt nógv sethús fyri fólk, i› standa sum ein var›i yvir tann partin av arbei›slívinum hjá honum*

**Merkisdagar**

24. juni kl. 11.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Martinsdóttir og Niels Viggo Niclasen, bæði úr Havn.

Leygardagin 24. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Pernille Mittún og Mohsen Darvishi. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 24. juni kl. 15.30 giftast í Kings College Chapel í Aberdeen, Rachel Lois Jack, kostráðgevi, Aberdeen og Rúni Djurhuus Joensen, sivilverkfrøðingur, sonur Karin og Eyðun, Tórshavn. Veitsla verður hildin fyri innbodnum á Maryculter House Hotel eftir vígsluna. Brúdleypsadr.: 6 Campsie Place Aberdeen AB15 6HL Scotland.

Leygardagin 24. juni kl. 12.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Jákupsdóttur og Sakaris Bech, Tórshavn. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru hjartaliga vælkomin í Sjónleikarhúsið ímillum kl. 13.00-18.00.

Leygardagin 24. juni kl. 10.30 giftast í Kelduni í Skálafirði, Dora Jacobsen, Saltangará og Petur Olivur Splidt, Tórshavn. Veitslan verður á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Leygardagin 24. juni kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Jeaneth Klementsen og Ernst Løkjá, bæði av Sandi. Veitslan verður fyri innbodnum í Virkinum á Sandi kl. 19.00.

Leygardagin 24. juni giftast í Haldórsvíkar kirkju Eydna Hermannsdóttir Thorsteinsson, ættað úr Klaksvík og Ronnie Samuelsen, ættaður úr Haldórsvík. Veitslan verður fyri innbodnum.

# Sancy er leys aftur úr Íslandi

**Sum skilst, er málið ikki endaliga avgreitt enn, men reiðaríið hevur veitt eina trygd upp á 7,5 mió íslendskar krónur**

SANCY-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyski djúpvatnstrolarin, Sancy, sum íslendska vaktarskipið, Óðin, tók í íslendskum sjógvi herfyri, liggur ikki longur á Eskifirði.

Sambært heimasíðuni hjá Visir, góvu íslendsku myndugleikarnir skipinum loyvi til at loysa í gjárkvøldi, eftir at reiðaríið hevur veitt eina trygd upp á 7,5 mió íslendskar krónur.

Málið varð fyribils avgreitt Í Héraðsdómi Austurlands í gjár, men bæði skipari og fyrsti stýrimaður hava nøktað seg sekar í at hava fiskað í íslendskum sjógvi.

Sum skilst á Visir, skal málið viðvíkjandi Sancy endaliga avgreiðast fyri fyrsta oktober.



*Mynd: Visir*